**Kári á Rógvi, ritstjóri**

Ritið hesu ferð er onnur og triðja útgáva av fimta árgangi (2005) av Føroyskum Lógar Riti. At geva tvær útgávur út undir einum kann verða neyðugt, tá støðan er tann, at útgávurnar eru seinkaðar ella órógvaðar á annan hátt. Fimti árgangur varð merktur av, at nógv tilfar varð seinkað ella tikið aftur.

Sætti árgangur (2006) er tó komin væl áleiðis í fyrireikingum, og vænta vit sum ætlað at geva trý rit út í heyst og tíðliga í vetur.

Í ritinum hesuferð er fyrst grein eftir Bárð Larsen og Kára á Rógvi um stovnin løgtingsins umboðsmann. Greinin er broytt útgáva av grein, sum áður er prentað í heiðursriti til Jóan Paula Joensen professara.

Í hesi kritisku grein royna vit at vísa á, hvussu margháttligur stovnur umboðsmaðurin í veruleikanum er fyri fólkaræðisligt rættarsamfelag. Alment verður hildið uppá, at umboðsmaðurin ikki tekur bindandi avgerðir, og at hansara myndugleiki bara er grundaður á dygdargóðu grundgevingar hansara; veruleikin er heldur, at umboðsmaðurin grundgevur ikki serliga væl, og at úrskurðir hansara verða virdir sum bindandi heldur enn sannførandi. Greinin leggur upp til, at umboðsmaðurin virkar sum serligur fyrisitingarligur rættur við víðkaðum heimildum, og at tann illa grundaða virðingin fyri stovninum kvalir neyðuga fakliga kjakið eins og breiðari politiska samskiftið.

Nýbrot er í seinastuni hend innan føroyska arbeiðsmarknaðarlóg. Nú er fasti gerðarrættur settur á stovn við sáttmála millum flestu partanna á arbeiðsmarknaðinum. Umboð fyri partarnar smíðaðu sáttmálan og onnur skjøl í drúgvum nevndararbeiði. Í kollektivum trætumálum í sáttmálaskeiðnum skal fasti gerðarrættur taka sær av øllum arbeiðsmarknaðarmálum viðvíkjandi stríðsstigum, marknamálum, brotum og tílíkum málum, ið ikki hava havt nakran fakkønan stovn higartil. Síðani býður fasti gerðarrættur seg fram sum gerðarrætt í tulkingarmálum og tílíkum, ið vanliga fara fyri serliga settan gerðarrætt. Nakrir høvuðstættir í hesi nýggju skipan verða lýstir í grein.

At enda í hesi útgávuni er forvitnislig frágreiðing frá kanningarferðum hjá fólkatingsins umboðsmanni í Føroyum eftir deildarleiðara og eftirlitisstjóra hjá danska umboðsmanninum Lennart Frandsen.